

Nr. 5 ***28. februar 2027*** **87. árg.**

Lívið

Mong fólk nú á døgum eru so ørkymlað og ráðleys. Tey renna higar og hagar sum fluga í fløsku og hava einki mið ella mál. Tey vita ikki, hvaðani tey eru komin, ella hvagar tey fara. Lívið hjá teimum hevur einki endamál. Tey eru døpur í huga, deprimerað. So fylla tey seg við nervatablettum. Men tað ger tey einki petti eydnusamari.

Jesus kemur við einum framúrskarandi tilboði: „Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu.“ (Matt. 11,28).

Tað síðsta, Jesus gjørdi, var at breiða armarnar út. Hansara favnur er nóg stórur til øll. Hann doyði við útbreiddum ørmum, og hann bjóðar øllum at koma til sín. Tá ið hann sigur „øll“, so meinar hann øll, og ikki fimta hvønn ella tíggjunda hvønn, ella tey, sum eru so fitt og góð. Hann leitar eftir tær og vil frelsa teg. Veitst tú, hvat ið fyrsti spurningur í Bíbliuni er? „Ádam, hvar ert tú?“ (1. Mós. 3,9). Og handa spurningin setur Jesus framvegis.

Tey, sum taka av tilboðnum, verða ikki vónsvikin, tí tá fær lívið eitt innihald og eitt endamál. Veitst tú hví? Tí at Jesus er sjálvt Lívið. „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið,“ sigur hann. (Jóh. 14,6). Hann gevur okkum eitt spildurnýtt lív, eitt lív við stóra L. „Tí, um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt.“ (2. Kor. 5,17). Ljóðar tað ikki gott at sleppa at byrja heilt av nýggjum?

At koma til Jesus er at bjóða honum inn í hjartað. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóh. 1,12.

Tá ið vit verða frelst, so er tað ikki tað sama sum, at nú gongur alt sum eftir ánni, nú eru eingir trupulleikar longur. Tað eru tað, tí henda verð er so súrgað av syndini. Men ein munur er, sum tey trúgvandi hava. Tey eiga ein so undurfullan frið í hjartanum, hóast umstøðurnar ikki eru góðar, og tey vita eisini, hvagar tey skulu fara við teirra trupulleikum, nevniliga til hann, sum eigur alt valdið í himli og á jørð til at hjálpa.

Harafturat vita tey trúgvandi, at tað besta liggur fyri framman. Jesus elskar okkum. Hann hevur givið sítt lív fyri okkum. Tí eru vit so glað. Nú er tað bara ein vegur fyri okkum, og tað er frameftir og uppeftir. Tá ið vit doyggja, fara vit spákandi inn gjøgnum perluportrið, tí vit hava Jesus í hjartanum, og hann er sjálvur vegurin hagar.

Æra skal Gud og Lambið verða, at Hann lutar sín Golgatasigur við okkum smáu menniskju, so at tað er møguligt hjá okkum at fara spákandi inn gjøgnum perluportrið og heim í tann bústaðin, sum Jesus hevur fyrireikað til hvønn einstakan okkara.

Effie Campbell.

Hástór og hugmóðig eyðmýkir Hann

Moses Hansen

Hetta bíbliuversið, sum eg skrivi her, er fyrst og fremst ætlað mær sjálvari. Tað stendur í Job 22,29: „**HÁSTÓR** og **HUGMÓÐIG** eyðmýkir Hann, men hjálpir tí, ið hyggur niður."

Um tú leitar í Bíbliuni undir orðum sum hugmóð, erpni, stoltleiki, sært tú fleiri hundrað brot og pettir, sum ávara ímóti tí hugburði.

HUGMÓÐ var orsøkin til fall Lucifers, sum upprunaliga var ein av teimum hægst mettu einglunum. Í stoltleika sínum segði Lucifer: „**EG SKAL** stíga upp til himna, verða líkur hinum hægsta!" Jes. 14,13–14.

Hasin hugburðurin førdi til fall hansara. Tí „framman undan undirgangi gongur **HUGMÓÐ**, og framman undan falli **STOLTLEIKI**." (Orðt. 16,18 V.D.)

Ein tann mest skakandi og ógvisliga lýsingin av **AVLEIÐINGINI** av **HUGMÓÐI**, stendur hjá Dánjali 4, 29–30: „Tá ið eg, Nebukadnezar kongur … spákaði uppi á takinum á kongshøllini í Bábel … segði **EG**: „Er hetta ikki Bábel hin

mikla, sum **EG** havi reist til kongssetur við veldiga mátti **MÍNUM**, tign **MÍNI** til heiðurs?“

Frá tí løtu tók Gud kongsvaldið frá Nebukadnezari, og hann livdi sum eitt dýr tey næstu sjey árini, til hann vendi um frá sínum **HUGMÓÐI**. Tað var Gud, sum hevði innsett Nebukadnezar, men **HUGMÓÐIN** fekk valdið – og hann gloymdi at geva Gudi heiðurin.

Tað er ein grund til 1. Tim. 2,2: „Biðið fyri kongum og øllum teimum, sum eru settir hátt!“

Tey hava makt – sum kann føra til hugmóð – sum kann føra til fall.

Effie Campbell umsetti.

Ein lívsríkandi vani

„Kvøld og morgun og miðan dag vil eg biðja.“ Sálm. 55,18.

Sálmaskaldið Dávid skilti hetta. Hann segði: „Kvøld, morgun og miðan dag vil eg biðja.“ Eisini Dánjal livdi eftir hesari reglu: „… tríggjar ferðir um dagin fell hann á knæ í bøn fyri ásjón Guds, eins og hann hevði verið vanur at gera.“ Dán. 6,11.

Hetta er ein vani, sum vísti seg at vera sterkur og úrslitagóður fyri báðar hesar menn – og tað er ein vani, sum eisini vil virka fyri teg!

„… et Ord til Dagen“ – Effie Campbell umsetti.

Blást verður í ávaringarlúðurin

Jan Hanvold

Gud sendir profetar at blæsa í ávaringarlúðurin. Eg hugsi um „Lebesbymannin“, mannin úr Lebesby, Anton Johansen – profetin, sum frammanundan segði frá, at Titanic fór at ganga burtur, og hann boðaði frá 1. og 2. veraldarbardaga. Tá ið hann í 1913 boðaði frá kríggi, varð flent at honum í Stórtinginum. Árið eftir kom fyrri veraldarbardagi.

Beint undan 2. veraldarbardaga kom, Carl Joachim Hambro, formaður í Stórtinginum við hesari ávaring: „Vit mugu ikki halda, at Noreg ikki kann verða álopið. Nú er tíð at vakna úr tornarósusvøvninum – annars kunnu vit verða vakt við einari vanlukku.“ Og 9. apríl hendi júst tað. Um tað ikki hevði verið fyri obersti Birger Eriksen og teimum gomlu kanónunum á Oscarsborg, sum søktu Blűcher, kundu bæði kongur og ríkisstjórnin verið tikin.

Hvat lærdu vit? Einki! Tí endurtekur søgan seg.

Góði vinur mín og bróðir, Emanuel Minos segði: „Um eg livi til komandi summar og sleppi at tala á stevnuni hjá Evangeliisentrinum, fari eg at spyrja: „Hevur Gud slept Noregi upp á fjall og sligið hondina av okkum?“ (Róm. 1). Noreg hevur sagt nei til Ísraels Gud. Lesið bókina hjá Minos „Det har ringt for tredje gang.“

Hann fekk, meðan hann bað og fastaði, eina profetiska sjón: hann sá eitt fremmant álop móti Norður-Noregi, við einum pistóli í Mo í Rana.

Tað er ikki neyðugt at vera profetur fyri at síggja, hvar ið hetta ber.

Effie Campbell umsetti.

Hans Nielsen Hauge: Tú skalt ikki blíva frelstur **í** syndini, men **frá** syndini. – Harrin talaði til Hauge og segði: „Tú skalt játta navn mítt fyri fólkinum og siga, at tey mugu **venda um!** – Bíblian kennist ikki við orðið „kulturkristin“!

e.c. ums.

Hermann Karlsen: Í 1970-árunum var veking her í Noregi. Tá varð nógv boðað um Jesu afturkomu. Men mong hava svikið, eru fallin frá og hava valt sær ein annan brúðgóm, tí Jesus er jú ikki afturkomin enn. Bíðitíðin tóktist teimum ov long. Mín áheitan á tey skal vera: „Vendið við og komið aftur til hin rætta brúðgómin, Jesus Kristus.“

e.c. ums.

Til tann, sum elskar Jesus: Tað besta liggur framman fyri tær, tí „Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað, sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann.“ 1. Kor. 2,9.

e.c. ums.

Sunnudagsblaðið er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

SUNNUDAGSSKÚLIN

28. febr.	**Tekstur:** 1 Mós,42,1-29, 42,39-43,1-15+32-33; 44 og 45	**Bíbliuorð:** Sl. 32,1
7. mars	**Tekstur: Pálmasunnudagur,** Matt. 21,1-9	**Bíbliuorð:** Matt. 21,5b

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74



Nr. 6 *14. mars 2027* **87. árg.**

Bið … aftur!!

Tá ið Gud vil hava okkurt gjørt, leitar hann, til hann finnur onkran, sum er villigur at gera hansara vilja. Gud sóknast eftir trúfesti. Eftir einum, sum verður standandi á varðhaldi undir trýsti, sum ikki rýmir, er vinglutur ella sjálvglaður, tá ið mótstøðan kemur. Nýggja Testamenti eggjar okkum til at hava Elia profet sum fyrimynd. Jákups bræv sigur, at Elia var maður undir somu korum sum vit og nevnir serliga hansara bønalív. Hann bað, og tað regnaði ikki í trý ár! Hann bað aftur, og himmalin læt seg upp og gav aftur regn yvir landið! Gud lítur á Elia, og Elia leit á Gud. Hann var gudsmaðurin, sum framdi uppgávuna, sum Harrin hevði givið honum. Hann bjóðaði Báals profetum av og førdi fólkið aftur undir lýdni og gudsótta.

Eftir ta ógvisligu uppgerðina á Karmels fjalli, kundi himmalin aftur lata seg upp og geva regn, og Elia boygdi seg til jarðar og bað fyri at loysa landið úr turkinum. Her síggja vit eina týdningarmikla síðu av bønini, og vit verða eggjað at taka okkum lærdóm av hesum. Elia bað og Gud svaraði beinanvegin upp á róp hansara yvir altarið á Karmel; men tá ið hann fer at biðja um regn aftur, síggja vit eina aðra síðu. Profeturin biður meir enn eina ferð. Tænastudrongurin verður sendur avstað at hyggja eftir bønasvarinum, men tá ið hann kemur aftur og má siga, at hann sær einki, so síggja vit ikki ein Elia, sum hugsar, at hann biður skeivt, og at hann ikki hevur hoyrt frá Gudi. Nei, hann biður bara aftur. Aftur fer drongurin at hyggja eftir bønasvarinum, og aftur fær Elia boð um, at har er einki at síggja. Fellur hann í fátt? Nei, hann fer bara aftur at biðja!

Hetta hendir ikki bara eina ferð, men ferð eftir ferð. Men Elia gevst ikki! Hann biður aftur! Og sjeyndu ferð kemur drongurin aftur við góðum tíðindum: Hann sær eitt lítið skýggj, sum kann boða frá regni. Tað stígur upp um sjónarringin. Bønasvarið er komið ígjøgnum. Elia visti, hvat ið Guds vilji var og helt á at biðja, til hann sá bønasvarið.

Í summar havi eg sæð henda mátan at biðja uppá. Á gøtum og torgum í Evropa vóru ungdómar úti og bóðu fyri sjúkum og vælsignaðu medmenniskju í Jesu navni. Um einki hendi fyrstu ferð, so bóðu tey aftur. Tey bóðu, til tey sóu bønasvarið, og brádliga verða høkjurnar rættar upp í loft, og ein maður rennur runt og rópar, at hann er grøddur. Ein annar hevur knæskaða, og biðið verður fyri honum. Einki hendir, men tey biðja aftur, og tá ið tey biðja fjórðu ferð, rópar maðurin hart. Knæið er fullkomiliga grøtt! Og vit kundu hildið á. So mangar grøðingar er útloystar, av tí at onkur hevur havt frímóð at biðið aftur. Tað gjørdi Elia. Tað kunnu vit eisini gera: biðja, og biðja aftur.

Anne Christiansen – Effie Campbell umsetti.

Hin fimti spurvurin

Einaferð talaði Jesus um fuglarnar (Matt. 10,29–30): „Verða ikki tveir spurvar seldir fyri ein skilling? Og ikki ein teirra fellur til jarðar uttan vilja faðirs tykkara.“ (donsk ums. „uttan at faðir tykkara er við honum.“)

Og í Lukasarevangeliinum 12,6 lesa vit: „Verða ikki fimm spurvar seldir fyri tveir skillingar? Og ikki ein teirra er tó gloymdur hjá Gudi.“

Jesus segði: Ikki ein tann einasti, ikki heldur tann **fimti spurvurin,** sum fylgdi ókeypis við, er gloymdur ella ikki lagdur til merkis.

„Et Ord med på Vejen.“ – Effie Campbell umsetti.

Nógv verdur

Góði tú, tú mást skilja, hvussu nógv tú ert verdur eftir Guds virðismáti – ikki eftir heimsins! Gud hevur tvær ferðirnar víst Jesusi, hvussu nógv tú ert verdur. Fyrst skapaði hann teg í sínari mynd, og tað merkir, at tú hevur skapandi (kreativ) evni. Síðani sendi hann son sín at frelsa teg, og tað hevði hann

gjørt, um tú so vart einasta menniskja á jørð. Hetta ger teg til ein ómetaligan dýrgrip! Hesir báðir óbroytandi sannleikar áttu at verið grundarlagið undir tínum sjálvsvirði.

Effie Campbell umsetti.

Støddin hevur einki at siga

Í Markus 16,2–4 lesa vit um tær tríggjar kvinnurnar, sum vóru á veg til grøvina hjá Jesusi. Á leiðini tosa tær sínámillum um, hvør ið skal velta steinina frá gravarmunnanum, tí at hann var ógvuliga stórur. Eg havi lisið mær til onkustaðni, at slíkir gravsteinar vigaðu hálvt annað tons. Tað var ikki smávegis. Konurnar høvdu ongan livandi møguleika at vika handa steinin. Men tá ið tær komu leiðina fram, var steinurin veltur frá. Gud hevði verið undan teimum og greitt henda trupulleikan.

Hasin steinurin er ein mynd upp á okkara trupulleikar. Øll hava vit kvalir og trupulleikar, eingin sleppur undan. Flest øll menniskju eru fitt, um vit biðja tey hjálpa okkum, so vil meginparturin siga ja. Tað er bara tað, at menniskjans armur røkkur so stutt. Gud er hin einasti, sum kann loysa trupulleikar til fulnar. Tá ið hann hjálpir okkum, er trupulleikin bæði væl og virðiliga loystur, og vandamálið tikið upp við rót.

Eg hugsi, at tað var einaferð í 1980-árunum, at Johan Maasbach, evangelistur úr Hollandi, var í Føroyum. Hann segði m.a. frá einari hending, sum mamma hansara hevði upplivað:

„Tá ið mamma var 85 ár, hevði hon trupulleikar við gallbløðruni. Hon hevði gallsteinar. Læknin segði: „Tygum mugu leggjast undir skurð."

Mamma fór so til hús og inn á kamar sítt, har hon hevði sín bønarkrók, eitt stað, har hon altíð bað. Hon lyfti hendurnar upp og segði: „Faðir! Eitt rennur mær í huga. Tá ið kvinnurnar gingu til grøvina, tosaðu tær hvør við aðra um, hvør ið skuldi rulla steinin burtur. Men tá ið tær komu leiðina fram, var steinurin longu rullaður til viks. – Gud mín, hvat hava hasir lítlu steinarnir, sum eg havi, at týða fyri teg. Harri, tak teir burtur."

Og Harrin tók teir burtur. Seinni spurdi onkur: „Frú Maasbach, hvat hendi við hasum steinunum?" – „Eg veit ikki, og eg leggi heldur einki í tað, tí eg eri grødd," svaraði mamma. „Kanska eru teir upploystir, líka veit eg."

Men hon hevði ongantíð aftur trupulleikar við gallinum. Hon livdi, til hon var 102 ára gomul.

Effie Campbell.

Vi trækker streger

1. Vi trækker streger og sætter skel
imellem andre folk og os selv.
Imellem alle dem vi kalder ægte,
og dem hvis ægthed vi så vil benægte.

2. Han fjerned grænser og sletted skel
og derfor slog de manden ihjel.
I evangeliet får vi at vide,
han stilled sig på de uægtes side.

3. Han slog en streg over hver en streg
som sættes mellem dig og mig.
Så ikke én af dem Vorherre skabte
skal kaldes udenfor og helt fortabte.

4. Et kors det danner, naturligvis
og det blev så hans kærlighedspris.
Og alle de der faldt uden for stregen
dem slog han følge med på hele vejen.

Johannes Møllehave

Hauge: Vit eru ikki sett at savna okkum pengar. Vit skulu ansa eftir, hvør ið treingir til okkurt, hvør ið hevur ein tørv.

e.c. ums.



SUNNUDAGSBLAÐIÐ

ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!



SUNNUDAGSSKÚLIN

14. mars	**Tekstur:** **Langafríggjadagur,** Matt. 27,31b-51+54	**Bíbliuorð:** Matt. 27,54c
21. mars	**Tekstur: Páskadagur,** Matt. 28,1-15	**Bíbliuorð:** Matt. 28,6a

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74